# Pedagogar

**Býlingshúsið undir Fjalli søkir eftir 4 pedagogum.**

**Størvini**
Talan er um eitt pedagogstarv, 30 tímar um vikuna í vøggustovu, við 12 børnum. Tvey pedagogstørv, 30 tímar um vikuna, á barnagarðsstovu við 20 børnum. Og eitt starv á barnagarðsstovu við 20 børnum.

**Stovnslýsing**
Í Býlingshúsinum undir Fjalli eru 52 børn, stovnurin er skipaður við eini vøggustovu og tveimum barnagarðsstovum. Økið rundan um stovnin er barnavinarligt og skjótt er at koma út í náttúruna, sum hevur ein stóran leiklut í gerandisdegnum.

**Førleikakrøv**
At tú hevur góð samstarvsevni og hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfólkum.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett tann 7. august 2000 ella eftir nærri avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri. Um pedagogar ikki verða settir í størvini, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Meir fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Maibritt Jacobsen, leiðara tlf. 314665, ella Katrin Petersen, samskipara tlf. 315160.

**Umsókn**
Saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Býlingshúsinum undir Fjalli, Fjalsgøta 25, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 19. juni 2000. Tilskila á umsóknina hvat starv tygum søkja.

# Pedagogar

**Býlingshúsið millum Gilja søkir eftir pedagogum í august og oktober**

**Størvini**
Talan er um eitt pedagogstarv, 40 tímar um vikuna í barnagarðsstovu við 20 børnum, at byrja 7. august 2000. Í sambandi við at stovnurin verður útbygdur, verður søkt eftir tveimum pedagogum, 30 tímar um vikuna, á barnagarðsstovu við 20 børnum at byrja 1. oktober 2000, og einum pedagogi, 40 tímar, til vøggustovu við 12 børnum at byrja 1. oktober 2000.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv í einum grannalagi, har náttúran hevur stóran týdning í tí dagliga arbeiðnum.

**Vit ynskja**
At tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt og er førur fyri at taka avgerðir í arbeiði sínum.

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri. Um pedagogar ikki verða settir í størvini, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Meir fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Kirstin Djurhuus, leiðara tlf. 318372, ella Katrin Petersen, samskipara tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Býlingshúsinum millum Gilja, millum Gilja 175, 188 Hoyvík, í hendi í seinasta lagi 19. juni 2000. Tilskila á umsóknina hvat starv tygum søkja.

Tórshavnar kommuna



Fíggjarmálastýrið
**Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið**

# Skrivari

Vegna barnsburðarfarloyvi er avloysarastarv sum skrivari hjá stjórnini leyst at søkja til setan frá 1. juli 2000.

**Arbeiðsuppgávur**
Í tøttum samstarvi við stjórnina røkir skrivarin m.a. hesar uppgávur:
- skipar fyri innanhýsis fundum, t.d. skráir, frásagnir og uppfylging
- røkir samskiftið millum økisstjórarnar og stjórnina
- viðger lønarspurningar
- røkir telefonsamskifti og brævaskifti hjá stjórnini, m.a. við norðurlond

Í samstarvi við hinar deildirnar í Stýrinum m.a. eisini hesar uppgávur:
- seta upp rundskriv, lýsingar o.a.
- rættlesa og umseta t.d. brøv, viðmerkingar til lógir o.a.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum at skrivarin hevur hesar førleikar og eginleikar:
- góðar samskiftisførleikar á føroyskum, donskum og enskum
- dugir at nýta Microsoft Word og Outlook — hetta er ein fyrimunur ikki eitt krav
- setir seg skjótt inn í ymisk viðurskifti
- sjálvstøðugan arbeiðshátt og kann raðfesta arbeiði
- góð samstarvsevni

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður lønt í 20. lønarflokki í sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið. Løn og setunarviðurskifti verða ásett eftir sama sáttmála.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum og ummælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. juni 2000.

**Toll- og Skattstova Føroya**
Stýrið
Postboks 2151
165 Argir

Vilt tú frætta nærri um starvið, kanst tú ringja til Marjun R. Simonsen á tlf 35 20 26.

Toll og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg- og inntøkuskattalóggávuna. Stovnurin hevur uml. 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum, ið er skipað í 4 deildir og heldur til á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, sum eru í Klaksvík, Saltangará, Sørvági, Skopun, á Tvøroyri og í Tórshavn, røkja raksturin.

**KN tag**
**Det bedste over hovedet...**
**- også på Færøerne**
- Tagpapdækning
- Efterisolering med Rockwool
- Tagrenoveringer
- Tagreparationer
- Renovering af skiffertage

**Op til 15 års garanti**

Medlem af DTBs Garantifond

KN Tagdækning A/S
www.kn-tag.dk - E-mail: post@kn-tag.dk
Bredalsvigvej 1 • Humlum • 7600 Struer
**Tlf.** 0045 **97 86 17 33** •
Fax 0045 97 86 12 05
Kimsvej 1 • 7500 Holstebro
**Tlf.** 0045 **97 40 19 33**
Industrivej 15 • 7700 Thisted
**Tlf.** 0045 **97 92 61 33**
Ring og få et godt tilbud.

**Kontakt vore medarbejdere på taget hos Ide Møbler, Tórshavn, i juni og juli**

**Honda Civic 1.4i til sølu**



Ein bilur í besta standi og sær út sum nýggjur.
Bilurin er frá mai 1997.

**Meiri fæst at vita á tlf. 21 82 46 ella 44 11 26**

**VEGG SAGING** Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.
**HOL SAGING** Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.
**GÓLV FRESING**
**GÓLV SLÍPING**
**GÓLV SAGING** Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.
**FØROYA BETONG SAGING** v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898
Sosialurin - 311820

Fartelefonir
Teldu Tænastan
www.tt.fo
Staravegur 5 - Postsmoga 1144 - FO-110 Tórshavn - Tlf.: 317620 - Fax: 317699




# Dansur á bryggjuni

*Tá sagt verður Dans På Brygga, so er talan um nakað heilt serstakt. Og tað er júst nøkrum serstakum, sum Tórshavnar Bátafelag skipar fyri við 20 harmonikum í Vágsbotni í kvøld. Umframt dans, so er møguleiki at fáa kaffi og grillaðar pylsur og drigið verður eisini um eitt gávubræv*

DAGFINN OLSEN

Í kvøld, leygarkvøld, skipar Tórshavnar Bátafelag fyri tiltaki Úti í Bakka í Vágsbotni. Tá tiltakið hjá Kiwanis er liðugt, tekur Bátafelagið við.

Væntandi verður rómur og dansihugur í Vágsbotni um vikuskiftið. Klokkan 21 byrjar tiltakið Dans På Brygga. Pallur er smíðaður og ljós sett upp, so umstøðurnar eru tær bestu hjá dansandi gestum og teimum 20 harmonikunum, ið fara at leika. Tað verða Tøkum Lætt og Dansifelag Kaggans, ið seta hol á og fara upp á gólv, tá tiltakið byrjar klokkan 21.

Umframt møguleikan at fáa sær ein swing-om, so kunnu dansigestir fáa kaffi og annað.

Umborð á deksbátinum Tinganes er ætlanin at seta upp grill, so ongum nýtist at ganga svangur í Vágsbotni leygarkvøldið. Á miðnátt verður drigið um eitt gávubræv uppá 500 krónur frá Hotel Hafnia.

Tórshavnar Bátafelag er virkið felag, ið hevur 2 ár á baki. Umleið 340 skrásetir limir eru í felagnum og eru teir kring allar oyggjarnar og uttanfyri landoddarnar.

Felagið heldur til í leigaðum hølum í Vágsbotni og hevur 3 ára leigusáttmála við Tórshavnar Havn. Talan er um virkið felag við nógvum jørnum í eldinum og nógvum ætlanum. Viðvíkjandi felagshølunum er ætlanin at gera altan á vestursíðuni á húsunum. Gamal dreymur hjá felagnum er gingin út, nú ravmagn er lagt út á allar bátabrúgvarnar. Arbeitt verður við at fáa vatn lagt út eisini.

Karmarnir eru góðir fyri útlendskum bátavitjanum og eru baði- og vaskimøguleikar. Felagið arbeiðir við at fáa í lag, at vatn og el kann seljast av bryggjukantinum til bátar.

Umhvørvispolitikkurin er greiður hjá felagnum og royntverður at halda pláss og bátahavnir so rein sum møguligt, hvat olju og øðrum burturkasti viðvíkir.

Bátafelagið hevur skipað fyri felags siglingarvitjanum og hevði m.a. í fjørsummar ein sera góðan túr til Trongisvágs at vitja bátafelagið Nadodd. Eisini varð vitjað í Kollafirði.

Ætlandi fara limir úr felagnum til Noregs komandi ár at sigla innanskers. Eittt annað av málum felagsins er at vitja allar oyggjar og bátahavnir í Føroyum innan rímuligt áramál.

Tiltakið Dans På Brygga er roynd at vinna felagnum nakað av peningi til virksemi felagsins.

Felagið arbeiðir fyri hugna og trivnaði á bryggjuøkinum og óivað verður bæði hugni og trivnaður í kvøld, tá 20 harmonikur leika til dans í Vágsbotni, meðan kaffiroykurin finnur nasarnar og pylsurnar snara sær á grillini umborð á Tinganesi.



*Væntandi verður rómur og dansihugur í Vágsbotni um vikuskiftið. Klokkan 21 byrjar tiltakið Dans På Brygga. Pallur er smíðaður og ljós sett upp, so umstøðurnar eru tær bestu hjá dansandi gestum og teimum 20 harmonikunum, ið fara at leika. Myndin er frá tiltakinum hjá Lions við fiskikappingin, Hvør fjøl á floti*



# Marknaðardagur í Havn

Afturvendandi marknaðardagurin hjá Kiwanis-felagsskapinum verður í Havn leygardagin frá klokkan 10.00 til 18.00. Tiltakið er á Bakka, frá Samvinnufelagnum og út á Tinganes.

Kiwanis er ein vælgerandi felagsskapur, sum javnan letur fíggjarligan stuðul til arbeiði ella tiltøk, har tørvur er. Fyrst og fremst royndir Kiwanis at hjálpa børnum.

Uttanlands er Kiwanis ein kendur felagsskapur, men í Føroyum eru bert tvey feløg í hesum felagsskapi. Hesi eru Kiwanis Rósan og Kiwanis Tórshavn, og bæði feløgini halda til í høvuðsstaðnum.

Marknaðardagurin er ein roynd at samskipa smærri áhuga- og frítíðarfeløg til eitt felags tiltak, har tey við egnum tiltøkum hava møguleika at útvega sær eitt fíggjarligt ískoyti til raksturin.

Umframt tað, sum tey ymisku feløgini hava at bjóða, fer Kiwanis at hav nøkur ókeypis tilboð til børnini.

Tað er neyðugt vi nógvum fyrireikingum til slíkt tiltak, og Kiwanis fegnast um, at tað eru fólk, sum fegin stuðla teirra virksemi.


# Føroya Tele - Søldarfjørður

**Montørur**

Søkt verður eftir einum montøri til Føroya Tele – Søldarfjørð. Arbeiðið er í stóran mun nýgerð og viðlíkahald av telefoninstalatiónum.

Tað krevst at tú dugir at arbeiða sjálvstøðgut, ert opin og at tú dugir at veita kundunum eina fyrsta floks tænastu.

Vit kunnu bjóða eitt áhugavert arbeiði við serligum atliti til
- nýgerð og viðlíkahald av instalatiónum
- vanligari telefonútgerð
- vekslarar
- innanhýsis kaðalskipanir
- uttanhýsis kaðalskipanum
- teleterminalar av ymiskum slag
- internet og ISDN
- rágeva kundum um felagaútgerð og tænastur.

**Útbúgving:** Elektrikari, líknandi útbúgving ella hollar arbeiðsroyndir.

**Starvsstaður:**
Øki-4 Eysturoy

**Uppmøtingarstað:**
Føroya Tele í Søldarfirði

**Byrjunnardato:**
Skjótast til ber

Starvið er lønt sambart sáttmála millum Føroya Tele og Starvsmannafelagið.

Áhugaði kunnu venda sær til starvsfólkadeildina á tlf.: 303030 ella Sofus Nielsen á tlf. 243740.

Umsóknirnar skulu verða starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 16. juni 2000 og skulu sendast til

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697

SANSIR · TEL 355 355